EB/Streymur-TB 3-0 (1-0):

# Felagslið við topp-eyðkennum

**EB/Streymur tykist hava fingið nøkur av eyðkennunum hjá einum oddaliðið. Í øllum førum man tað vera langt síðani - um nakrantíð - at liðið somikið ómaksleyst er komið at trimum stigum í bestu deildini**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*



*Egil á Bø átti seinasta málið til 3-0, men tá høvdu heimamenninir longu punkterað linliga dystin á Eiði mikudag*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Seinasti dysturin í 23. umfarinum av Formula-deildini varð spælt mikudagin, tá EB/Streymur og TB avgreiddu dystin, sum varð avblástur vegna vána veður sunnudagin.

Tølini staðfesta, at heimaliðið vann dystin við trimum málum móti ongum, og tað endurspeglar í nógvar mátar veruleikan, sum sæst á stigatalvuni.

## Munurin á toppi og botni

Har er TB niðast, og á Eiði sunnudagin spældu teir eisini hareftir. Viljin at vinna og at stríðast tóktist vera ógvuliga avmarkaður. Og hóast teir í løtum væl og virðiliga sluppu at taka lut í spælinum, so megnaðu teir at kalla ongan tíð at gera sær dælt av hesum. Í øllum førum ikki, um metast skal í málmøguleikum, tí verður sæð burtur frá nøkrum hálvum og kanska tríkvartum av slagnum, so vóru hesir ikki til.

Hinvegin sýndu heimamenninir í ávísan mun tær dygdir, sum vanliga eyðkenna eitt oddalið. Ikki minst tann veruleikin, at teir megnaðu at vinna ein púra tryggan 3-0 sigur, uttan at teir nakran tíð veruliga spílaðu seg út. Serstakliga var talan um lága leikferð fyrsta hálva tíman, og nógv mundu halda, at TB hesa løtuna eins væl kundi lagt seg á odda, sum vertirnir. Men tað júst slíkir lutir, sum oftani eru munin millum vinnarar og taparar.

EB/Streymur hevur at kalla ikki uppliva annað enn viðrák seinastu longu tíðina. Síðani summarsteðgin hava teir vunnið 16 av 18 stigum. Og liðið hevur ikki tapt seinastu 11 umførini. Tað ger, at spælararnir verða munandi meira róligir. Fjálturin, sum oftani førir persónlig mistøk við sær, er at kalla burtur, og hóast spælið ikki er upp á tað besta, so hevur hvør einstakur í liðnum eina sannføring um, at málið nokk skal koma.

TB hevur hinvegin bert upplivað mótrák nú í nógv umfør. Verður dysturin á Eiði taldur við, hevur liðið í 14 dystum bara vunnið trý stig. Tað hevur sjálvandi eisini sett síni merki í sjálvsálitið á spælarunum. Eitt sjálvsálit, sum í løtuni tykist vera mest sum ikkieksisterandi, og har sjálvt lættar temjingar og sendingar yvir bara fimm metrar, ikki eydnast.

## Ein perla avgjrøði

Fyrsta málið í einum dysti er ofta tað týdningarmesta, verður sagt. Sum so mundi talan eisini vera um slíkan týdning hesaferð, men meira enn nakað, sum var mátin, sum málið kom uppá, eisini ein undirstrikan av, hvussu tilvildin og eydnast aloftast fyltir ovaru støddu liðunum. Ella er hetta eisini bara eitt tekin um, at hesi lið í størri mun megna at leita eftir hepninum.

Talan var í øllum førum ikki um serliga vandamikla støðu, tá EB/Streymur royndi seg við skoti. Onkursvegna, so stiklaði bólturin tó upp um fyrsta verjuspælaran, áðrenn skrúvandi bólturin fullkomuliga snýtti Óla Johannesen, og so var Sorin Angel - á Eiði verður hann nú kallaður Skorin! - ísakaldur, tá hann skoraði sítt sjeynda mál í fýra dystum.

Og so gjørdist munurin millum liðini enn meira sjónligur. Ferðin var framvegis ikki tann stóra, men tað spælið, sum var, áttu vertirnir. Teitur Joensen kundi kanska økt, men skotið var ikki eins hegnisligt, sum driblingarnar, og so máttu liðini fara til hálvleiks við 1-0 á máltalvuni.

Eftir steðgin hendi ikki tað heilt stóra. TB megnaði sjáldan at trýsta seg fram til nakað serligt, og í hinum endanum komu heimamenninir hampuliga lætt fram til nakrar møguleikar, og í tveimum førum tóku teir so av. Ikki minst var talan um framúr mál, tá Gert Hansen av brotsteigarhorninum høgdi bóltin í mótsatta tríkant, samstundis sum hann við hesum avgjørdi dystin fult og heilt.

## GÍ-dysturin er stóra uppgávan

Tað hevur verið sagt fyrr, og veruleikin hjá TB er ikki stórt øðrvísi eftir mikukvøldið. Við fimm stigum upp til VB, gerst hóttandi niðurflytingin alt meira veruleikanær, men enn er tó ikki heilt liðugt.

Talan má í øllum førum sigast at vera um veruligan lykladyst, tá GÍ kemur á vitjan sunnudagin, og kanska sat hetta eisini onkursvegna í høvdunum á spælarunum mikukvøldið. Sjálvandi er tað ikki tilvitað, men veruleikin hevur tað ofta við at hátta sær soleiðis, at stendur ein risauppgáva nakað fyri framman, so kámar hendan tær, sum eru á vegnum, og tað var kanska ein frágreiðing til laka avrikið hjá TB mikukvøldið.

Hjá EB/Streymin er støðan bæði øðrvísi og betri. Næstu ferð er tað B36, sum vitjar. Tann uppgávan tykist kanska trupul, men á Eiði er einki at rokna sum ógjørligt í ár. Spurningurin tykist bara vera, hvussu langt upp liðið kann røkka við 12 stigum í seinastu fýra dystunum. Og tað er so nakað, sum teir á felagsliðnum ikki eru harrar yvir.

## FAKTA

**EB/Streymur-TB 3-0 (1-0)**
1-0 Sorin Anghel, 34.
2-0 Gert Hansen, 51.
3-0 Egil á Bø, 77.
**Dómari:** Lassin Isaksen.
**EB/Streymur:** René Tórgarð - Gert Hansen, Andrzej Pacek, Fróði Clementsen, Jóhann á Stongum - Bárður Olsen (Jákup Martin Joensen, 84.), Marni Djurhuus, Ronnie Samuelsen, Teitur Joensen (Sonni L. Petersen, 72.) - Sorin Anghel (Brian Olsen, 80.), Egil á Bø.
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Tórur Holm (Pætur Holm, 64.) - Allan Poulsen (Búi Mortensen, 80.), Aleksandar Jovevic, Einar Petersen, Allan Smedemark (Mortan Enni, 72.) - Dejan Tomic, Hallur Christiansen.
**GK:** Aca Petrovic 70.

# Klokkureint

**Maðurin við vakrasta málinum mikudagin var sjálvandi í góðum lag. Og hann staðfesti, at tað er restin av hópinum eisini**

FÓTBÓLTSPRÁT

*Jákup Mørk*

Oftani hevur verið tikið til, at Mølin á Eiði er tann vøllurin í landinum - og kanska í Europa - sum hevur vakrasta umhvørvið.

Men seinastu tíðina hevur ein onnur staðfesting eisini sníkt seg fram. Í øllum førum munnu áskoðarar kring vøllin vera samd um, at tað eisini er her, at tey vakrastu málini verða skotin.

## Bárður royndi

Í so máta var tað Gert Hansen, sum stóð fyri tørni mikudagin, tá hann í seinna hálvleiki punkteraði dystin við málinum til 2-0. Eitt mál, sum ongan vardi, fyrr enn Gert við einum drønskoti meddaði bóltin í málhornið.

Gestirnir vildu vera við, at talan skuldi verið um fríspark, áðrenn tað kom so langt, og hesum avvísti málskjúttin heldur ikki.

- Eg fekk bóltin á miðvøllinum, og dómarin kundi helst havt bríkslað, tí hann støkk eitt sindur í armin, áðrenn eg dróg avstað, men har kom einki ljóð. Í nógvum førum vildi eg kanska valt innleggið, tá eg so hevði drigið omaneftir, men hesa ferð skeyt eg, og eg rakti hann í øllum førum væl.

*Tað sá eisini út til, at Bárður royndi at endurtaka bragdið, tá hann nakað seinni hevði rikið seg leysan í høgru?*

- Ja, eg haldi at hann eisini vildi skjóta eitt slíkt mál, men tað riggaði so ikki hjá honum hesaferð, flennir Gert.

## Ein finala í senn

Um dystin sjálvan helt hann, at hesin í nógvar mátar vísti styrkina, sum EB/Streymur hevur í løtuni.

- Moralurin hjá okkum er í øllum førum í topp, nú tað hevur gingið so væl. Hesa ferð spæla vit ikki serliga væl, men vit vinna kortini trygt, og tað sigur nakað um styrkina, haldi eg.

*Og tað er kanska heldur ikki so, at tit verða fjáltursstungnir, tá alt ikki koyrir eftir vild?*

Nei, slettis ikki. Vit royna bara at spæla okkara spæl, og í so máta er tað nógv vert, at Ronnie nú aftur er við okkum. Hann megnar ofta at píska okkum víðari, og blíva vit við, so vita vit, at málini nokk skulu koma.

*Longu nú hava tit vissað tykkum, at endastøðan verður tann besta í felagsstøðuni. Sikta tit framvegis longur upp?*

- Sjálvandi. Vit hava fýra dystir eftir, og kunnu vit vinna teir, so verða vit í øllum førum nummar fýra. Næstu ferð verður tað so B36, og tá skulu vit geva alt, um vit skulu hava stig burturúr. Og soleiðis verður tað hvørja ferð. Tað er at kalla finala hvønn dystin, og hjá okkum ræður so bara um at taka ein dyst í senn, staðfestir Gert Hansen at enda.